

TOYOTA

## Móttøka í Klaksvík

Leygardagin 12. november kl. 14.00 vilja vit fegin bjóða til móttøku í nýggja byggningi okkara í Klaksvík.



| | |
|---|---|
| Kl. 14.00 | Húsið letur upp. Monika Stauss Joensen & Dánjál Eysturstein spæla. |
| Kl. 14.20 | Eivind av Reyni, bjóðar vælkomin og sigur eitt sindur um nýggja bygningin. |
| Kl. 14.30 | Laila av Reyni syngur. |
| Kl. 14.40 | Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, heldur røðu. |
| Kl. 14.50 | 17 sangarar úr Klaksvík syngja. |
| Kl. 15.00 | Okkurt til matna, og høvi at síggja bygningin við ymisku útgerðini. |

Dúgvan siglir av Leirvík leygarmorgunin kl. 11.00.

Toyota Klaksvík · Tel. 456669 · Fax 457669
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

TEAM85

Samferðsluráðgevi




# Vilt tú knýta Føroyar tættari saman?

Samferðsluøkið er í stórari broyting. Nýggjur Smyril er komin til landið, og Norðoyartunnilin verður skjótt tikin í nýtslu. Føroyar verða alsamt tættari knýttar saman, og tað gevur nýggjar møguleikar og avbjóðingar.

Vilt tú verða við til at mynda hesa gongdina, so er eitt starv sum samferðsluráðgevi á Samferðsludeildini leyst at søkja. Talan er um eitt breitt, krevjandi og spennandi starv, sum tú fært høvi til at mynda og byggja upp.

**Starvið**
Uppgávan hjá Samferðsludeildini er at skipa almenna samferðsluøkið. Vit leggja til rættis, stýra, selja og samskipa almennu ferðsluna á sjógvi og landi, sum eru Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Sum samferðsluráðgevi fært tú ábyrgd fyri rutuplanlegging og fyriskipan av ferðaætlan. Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. at greina ferðslumynstrið, marknaðin og prísskipanina. Tú kemur at standa fyri hagtalsgreiningum, at optimera og samskipa leiðirnar, og tú verður við til at menna nýggjar tænastur. Útbjóðing av leiðum og sáttmálastýring verður somuleiðis títt starvsøki.

Nú ferðslumynstrið í Føroyum broytist, liggja fleiri størri uppgávur og verkætlanir fyri framman, sum tú verður partur av. Tað snýr seg um

- at gera heildarætlan fyri samferðslukervið
- at fyrireika nógvu broytingarnar í sambandi við Norðoyatunnilin
- at innføra kt-amboð til rutuplanlegging og kunning
- at fyrireika næstu útbjóðing av Bygdaleiðum
- at fyrireika nýggja ferðaseðlaskipan
- at menna skipaða marknaðarføring

**Førleikakrøv**
Vit rokna við, at tú hevur hægri útbúgving innan verkfrøði ella búskap. Hevur tú royndir í fakinum, og ert tú vanur við at arbeiða við prosjektum, so er tað ein avgjørdur fyrimunur.

Tú hevur evnini at arbeiða sjálvstøðugt og málrættað. Tú ert ágrýtin, hevur góð samstarvsevni og eitt lætt lyndi. Og so orðar tú teg greitt og væl, bæði munnliga og skrivliga.

**Umsókn og treytir**
Starvið verður sett sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknarfreistin er 17. november klokkan 12. Send umsóknina við próvskjølum og møguligum viðmælum til: Strandfaraskip Landsins, att. Starvsfólkadeildin, Boks 88, FO-110 Tórshavn.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Andrass Jensen, deildarleiðara, á telefon 34 30 00 ella t-post anj@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

sansir.fo